# – Vandi í at vera fremst

**– Tað kann vera ein vandi í at liggja fremst í eini veljarakanning so stutt áðrenn valið, og tí er tað umráðandi, at Javnaðarfólk ikki setast aftur týsdagin, sigur John Johannesen, valevni hjá Javnaðarflokkinum**

FÓLKATINGSVAL
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Javnaðarflokkurin stendur til at fáa ein gott fólkatingsval og at endurvinna fólkatingssessin, sum Jóannes Eidesgaard misti fyri fýra árum síðani. Sambært veljarakanningini hjá Gallup er Javnaðarflokkurin best umtókti flokkur til valið týsdagin.

– Tað kann vera ein vandi í at liggja fremst í eini veljarakanning so stutt áðrenn valið, og tí er tað umráðandi, at Javnaðarfólk ikki setast aftur orsaka av tí góða úrslitinum, men at tey fara á val, sigur John Johannesen, løgtingsmaður og valevni hjá Javnaðarflokkinum.

– Sjálvandi skulu vit fegnast um góða úrslitið, men vandin er, at fólk halda flokkin verða tryggan, at tey ikki fara á val. Vit mugu fáa øll okkara fólk á val fyri at tryggja flokkinum eitt gott úrslit.

## Tríggir fara at kappast

Javnaðarflokkurin hevur síðsta árið átt løgmann, og tað hevur eftir øllum at døma styrkt flokkin – eisini í valinum til Fólkatingið.

– Tað er hugaligt, at vit standa okkum so væl í veljarakanningini. Fólk taka eftir øllum at døma við okkara linju og ásanna, at Javnaðarflokkurn er lykilin til eina tjóðskaparliga semju, sigur John Johannesen.

Hann roknar við, at tað verða tríggir av teimum stóru flokkunum, sum fara at kappast um tey tvey plássini í Fólkatinginum.

– Eg rokni ikki við, at Sambandsflokkurin fer at blanda seg upp í stríðið, men tað tykist verða rættiliga javnt millum hinar tríggjar stóru flokkarnar, sigur John Johannesen.



*– Tað er hugaligt, at vit standa okkum so væl í veljarakanningini. Fólk taka eftir øllum at døma við okkara linju og ásanna, at Javnaðarflokkurn er lykilin til eina tjóðskaparliga semju, sigur John Johannesen*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# – Vit fara at klára tað

**– Tað er gott, at veljarakanningin ikki er ov góð fyri okkum, so at soldátarnir ikki sovna beint áðrenn valið, sigur Torbjørn Jacobsen, ein av spíss-kandidatunum hjá Tjóðveldisflokkinum**

FÓLKATINGSVAL
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tjóðveldisflokkurin stendur sambært veljara-kanningini hjá Gallup Føroyar til at endurvinna fólkatingsumboðið, men tað er sera lítil munur á Tjóðveldisflokkinum og Fólkaflokkinum.

– Tað er merkisvert, at Fólkaflokkurin stendur seg so væl í veljarakanningini, men eg rokni við, at vit fara at hava munin á teimum á valinum, sigur Torbjørn Jacobsen.

– Tá ið Fólkaflokkurin samstarvar við Sambandsflokkin, plagar hann at eta burtur av Sambandsflokkinum, meðan Tjóðveldisflokkurin plagar at fáa av tí betra endanum í Fólkaflokkinum, teimum mest fullveldissinnaðu.



*– Tað er sera tætt í veljarakanningini, men eg vænti, at Tjóðveldisflokkurn fer at fáa annað umboðið, og at munurin verður størri enn í veljarakanningini, sigur Torbjørn Jacobsen*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Munurin verður størri

Persónsstríðið, sum hevur verið millum Høgna Hoydal og Torbjørn Jacobsen, tykist ikki nerva møguleikarnar hjá Tjóðveldisflokkinum fyri at fáa fólkatingsumboð í fýra ár afturat.

– Úrslitið í veljarakanningini kemur ikki so óvæntað á meg. Tað er nakað síðani, at eg segði, at Javnaðarflokkurin fer at fáa ein ágóða av løgmanseffektini, meðan vit sum stóru andstøðuflokkurin eisini fara at standa okkum væl, sigur Torbjørn Jacobsen.

– Tað er sera tætt í veljarakanningini, men eg vænti, at Tjóðveldisflokkurin fer at fáa annað umboðið, og at munurin verður størri enn í veljarakanningini.

# – Vit hava gott mót

**– Fólkaflokkurin plagar ikki at standa seg so væl í eini veljarakanning, so hetta gevur gott mót, sigur Jørgen Niclasen, løgtingsmaður fyri Fólkaflokkin**

FÓLKATINGSVAL
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Hóast Fólkaflokkurin í kanningini hjá Gallup er akkurát ov stuttur til ein fólkatingssess, so hevur kanningin skapt optimismu í flokkinum.

– Vit plaga ongantíð at klára okkum væl í veljarakanningum, og tí eru vit eitt sindur ovfarin av, at úrslitið í hesari kanningini var so gott. Hetta gevur gott mót til valið, sigur Jørgen Niclasen, sum er eitt av valevnunum hjá Fólkaflokkinum.

– Hetta skuldi verið eitt signal til fólkafloksveljarar og aðrar veljar, sum sympatisera við okkum, um at fara á val týsdagin.

## Ikki so uppbýtt longur

Jørgen Niclasen heldur, at borgarligir veljarar í Føroyum skulu hugsa seg um, tá ið teir fara á val.

– Í løtuni standa tveir sosialistiskir flokkir til at fáa umboð í fólkatingið, og tí mugu borgarligir veljarar í Føroyum hugsa seg, tá teir fara á val. Fólkaflokkurin kann vera røddin hjá teimum borgarligur og sjálvstýrissinnaðu føroyingunum, sigur Jørgen Niclasen.

– Føroyskur politikkur er ikki so uppbýttir í tveir blokkar, sum hann var fyri tveimum árum síðani, og tað er helst ein vansi fyri Sambandsflokkin og kanska ein fyrimunur fyri Fólkaflokkin.



*– Føroyskur politikkur er ikki so uppbýttir í tveir blokkar, sum hann var fyri tveimum árum síðani, og tað er helst ein vansi fyri Sambandsflokkin og kanska ein fyrimunur fyri Fólkaflokkin, heldur Jørgen Niclasen*

# mlar vanar av

fólk at fara á val og gera hana til skammar og velja ein persón heldur enn ein flokk, sum tey plaga at gera, sigur hann.

Hann vísir á, at fólk í stóran mun velja av vana. Tað vil siga ein flokk, og finna so ein persón í flokkinum at seta krossin við.

Heldur skuldu tey funnið sær perónin fyrst og so flokkin aftaná. Tí so høvdu valevnini hjá Miðflokkinum eisini havt ein møguleika, heldur hann.

Annars heldur hann ikki, at veljarakanningin er so heilt galin, um sammett verður við seinasta fólkatingsval. Tá gav ein veljarakanning Miðflokkinum bara 0,9 prosent av atkvøðunum. Men valúrslitið vísti 2,1 prosent. Nú sigur veljarakanningin3,1 prosent. So um lutfallið millum kanning og valúrslit verður tað sama sum seinast, stendur kanska ikki so heilt illa til hjá Miðflokkinum, heldur formaðurin.

Hann vísir á, at teir stóru flokkarnir, hvør í sínum lagi, alla tíðina kasta hvørjum øðrum fyri alt tað ringa, teir hava gjørt.

– So tað er bara hjá veljaranum at taka teir upp á orðið og velja okkurt annað, heldur Jenis av Rana.



*Fólk eiga at leggja gamlar vanar og gamlar flokkar av og velja ein persón, sum kann og vil nakað, heldur Jenis av Rana, formaður í Miðflokkinum*

Hann heldur tað als ikki vera so órealistisk at vóna, at Miðflokkurin kann gera eitt so mikið gott val, at hann veruliga kann gera seg galdandi.

– Seinast fingu vit 1.600 atkvøður. Og um nú allir hesir 1.600 veljararnir fingu bara ein veljara við sær í part at velja okkum, so vóru vit har uppi, at vit veruliga kundu hótt teir stóru flokkarnar, sigur ein vónríkur Jenis av Rana, formaður í Miðflokkinum.

Hann heldur tað vera av týdningi at stilla upp, hóast ein kortini ikki verður roknaður millum teirra, sum hava nakran møguleika.

– Vit eiga við eitthvørt høvi at vísa, at flokkurin er til, og samstundis royna at styrkja hann.

# – Vit stríðast fyri kjansinum

**– Tað er langt upp til teir stóru flokkarnar, men vit ætla at stríðast fyri einum góðum úrsliti, sigur Malan Johansen, valevni hjá Sjálvstýrisflokkinum**



FÓLKATINGSVAL
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Veljarakanningin hjá Gallup gevur ikki teimum smáu flokkunum serligar møguleikar fyri av álvara at blanda seg upp í stríðið um fólkatingssessirnar.

Sjálvstýrisflokkurin fær í kanningini fýra prosent av atkvøðunum, og tað er langt frá nóg mikið til nakran sess í danska parlamentinum.

– Vit kunnu fegnast um, at vit í kanningini hava stóra framgongd samanborið við fólkatingsvalið seinast, og vit vóna sjálvandi, at framgongdin heldur fram líka til valdagin, sigur Malan Johansen, sum er eitt av valevnunum hjá Sjálvstýrisflokkinum.

## Langur vegur

Sjálvsstýrisflokkurin hevur í nógv ár havt tað trupult til fólkatingsvalini, og tað hevur ikki verið óvanligt, at flokkurin hevur fingið minni undirtøku til fólkatingsval enn løgtingsval.

Hóast formaðurin í flokkinum, Kári P. Højgaard, hevur tosað hart um, at Sjálvstýrisflokkurin veruliga hevur ein kjans á valinum og er tað einasta veruliga alternativið til teir stóru flokkarnar, so er tað trupult at fáa veljararnar at taka undir við hesum sjónarmiði.

– Tað er langt upp til teir stóru flokkarnar, men vit ætla at stríðast fyri einum góðum úrsliti. Um tú ikki hongur í, so hevur tú ongan kjans, sigur Malan Johansenø